Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum skrivar

# Longur inn á basaltið

**-Vit vita, at hetta er eitt tøkniliga avbjóðandi øki at arbeiða á, har fíggjarligi váðin er stórur. Hinvegin kann vinningurin verða ovurhonds stórur um kolvetni verður funnið í bert einum av teimum stóru strukturunum, sum eru kortlagdir undir basaltinum. Ein boring á hesum øki hevði tí givið virðismikla vitan til frama fyri framtíðar leitiarbeiðið á føroyska landgrunninum**



OLJUFRAMTÍÐ

*Bjarni Djurholm*
*Oljumálaráðhari*

Mikudagin í farnu viku var freistin út hjá oljufeløgum at handa umsóknir um leitiloyvi í øðrum útbjóðingarumfarinum á føroyska landgrunninum. Oljufyrisitingin hevur fingið 9 umsóknir frá 8 oljufeløgum, sum hava skipað seg í 5 samtøk ella einstøk feløg. Í løtuni verða umsóknirnar viðgjørdar á Jarðfrøðisavninum og í Oljufyrisitingini. Síðan verða fundir við feløgini, fyri at samráðast um innihaldið í umsókníni, har dentur verður lagdur á jarðfrøðiligu arbeiðsætlanina, arbeiðið at menna virksemið á landgrunninum, til tess at búna øki til framtíðar leiting og arbeiðið við at menna føroyskan førleika. Í metingini av umsóknunum, verður dentur serliga lagdur á jarðfrøðiligu arbeiðsætlanirnar, sum feløgini bjóða, tí tær áseta, hvørjar kanningar loyvishavararnir skulu gera fyri at staðfesta, um kolvetni finnast á loyvisøkunum.

## Annað útbjóðingarumfar

Endamálið við at fara undir annað útbjóðingarumfar er at skapa grundarlag fyri framhaldandi leitivirksemi á landgrunninum, soleiðis at vit kunnu kortleggja kolvetnistilfeingið og lýsa møguleikarnar fyri vinnuligari kolvetnisframleiðslu í Føroyum. Tað er partur av okkara ætlan fyri leitivirksemið, at hetta verður flutt longur inn á landgrunnin - inn á øki, har leitimiðini eru fjald av basaltfláum, og at fjøltáttaðir leitimyndlar verða royndir.

Teir fýra fyrstu brunnarnir, sum eru boraðir, vórðu grundaðir á leitimyndlar, ið líkjast Foinhaven og Schiehallion oljuleiðunum bretsku megin markið. Tó hevur verið leitað eftir olju hinumegin markið síðan 1972, og eru gjørd ein røð av gass- og oljufundum víða um, har ymiskir leitimyndlar hava ligið til grund. Vit ynskja, at hesir somu møguleikar verða troyttir á føroyskum øki.

Umframt tað leiti- og kanningararbeiði, sum er og fer at verða gjørt sum úrslit av fyrsta og øðrum útbjóðingarumfari, er næsta avgerandi stig fyri oljuleiting á landgrunninum, at oljufeløg vilja bora ein brunn gjøgnum basaltfláirnar fyri at staðfesta, hvør jarðfrøðin er undir basaltinum og hvørjir møguleikar eru fyri, at kolvetni kann verða goymt her. Vit vita, at hetta er eitt tøkniliga avbjóðandi øki at arbeiða á, har fíggjarligi váðin er stórur. Hinvegin kann vinningurin verða ovurhonds stórur um kolvetni verður funnið í bert einum av teimum stóru strukturunum, sum eru kortlagdir undir basaltinum. Ein boring á hesum øki hevði tí givið virðismikla vitan til frama fyri framtíðar leitiarbeiðið á føroyska landgrunninum.



### Fyrsta útbjóðingarumfar

7 leitiloyvi vórðu latin í 2000. Millum arbeiðsskyldurnar vóru tilsamans 8 brunnar, uml. 40 mió kr til Sindri verkætlanina og 86 mió. kr. til føroyska luttøku. Fýra brunnar eru boraðir, og hava teir staðfest, at undirgrundin goymir eina virkna kolvetnisskipan. Harumframt innihelt brunnurin hjá Faroes Partnership við Amerada Hess sum fyristøðufelag týðandi nøgdir av olju og gassi. Enn er ikki greitt hvørt hesin fundurin er rakstrarverdur. Umleið 60 mió. kr. av førleikamenningarpengunum eru brúktar, m.a. til Ph.D verkætlanir, master útbúgving á Handilsskúlanum, verkætlanir innan vindorku, aling á streymasjógvi, menning av útgerð til fiskivinnuna o.a.

### Annað útbjóðingarumfar

Økið, sum varð boðið út, er umleið 19.000 ferkilometrar til støddar, og er býtt upp í 83 heilar teigar og 39 part teigar. Eitt samfast øki liggur eystanfyri og í ein landsynning úr Føroyum, og tvey einstøk smærri øki liggja í ein útsynning sunnan. Inn komu 9 umsóknir frá tilsamans 8 feløgum.

Miðað verður ímóti at veita loyvini í fyrru helvt av januar.


ChevronTexaco







**People, Partnership and Performance**



At ChevronTexaco, our vision is to be the global energy company most admired for our people, partnerships and performance. That means helping meet Europe's energy needs while striving for the highest standards of environmental protection and working through partnerships with others who share our values and are also committed to safeguarding the natural world for future generations.

ChevronTexaco Upstream Europe, Seafield House, Hill of Rubislaw, Aberdeen Please visit www.chevrontexaco.com












**Vælkomin 3-5 mai 2005**

**á Sandvíkarhjalla í Tórshavn**

**Skrásetið tykkum nú til altjóða fiskivinnu- og aliframsýningina á**

**www.fair.fo**

THE FAROE ISLANDS

NORTH ATLANTIC FISH FAIR

INTERNATIONAL FISHING & AQUA CULTURE EXHIBITION

petur & petur • +298 320870

**Fakta um North Atlantic Fish Fair 2003**

**Framsýnarar: 307 úr hesum16 londum:**
**Kanada, Danmark England, Finnland, Føroyum, Fraklandi, Týsklandi, Íslandi, Korea, Litava, Noreg, Portugal, Skotlandi, Spania, Svøríki og Hetlandi.**

**Vitjandi: 10.800 úr hesum 22 londum:**
**Kanada, Danmark England, Finnland, Føroyum, Fraklandi, Gambia, Grønlandi, Niðurlondum, Írlandi, Japan, Póllandi, Týsklandi, Íslandi, Korea, Litava, Noreg, Portugal, Skotlandi, Svøríki, Spania og Hetlandi.**

Sponsored by:

Faroe Ship ATLANTIC AIRWAYS FØROYA BANKI Tórshavnar kommuna